## DAGSINS MEINING

# Ríkisfundur í sjálvstýrisglæmu

Ríkisfundurin ígjár bar óivað dám av, at føroyska og grønlendska fólkið ynskja størri politiskt sjálvstýri og búskaparligt sjálvbjargni. Hetta var í øllum førum tað, sum Anfinn Kalsberg, løgmaður, ætlaði at seta á dagsskránna. Í Grønlandi er nýliga komið eitt drúgvt álit um eina grønlendska sjálvstýristilgongd, so hetta er neyvan farið aftur við borðinum uttan umrøðu.

Ein stórur partur í føroyska fólkinum – og ein ikki so lítil partur í grønlendska fólkinum – hevur ynskt at fáa víðgongt sjálvstýri, og í Føroyum eru stundum nøkur málsøki tikin yvir, men í grundini er tað løgið, at hesar tjóðirnar í Norðuratlantshavi ikki hava sett út í kortið eina miðvísa sjálvstýristilgongd, bygd á skynsemi og fyrisitingarligar og búskaparligar veruleikar fyrr enn eftir eitt búskaparligt skrædl.

Ríkisfundurin hevur ikki nakra formliga skrá, og tí kunnu summi ivast í, um fundurin hevur nakran týdning, men bara tað, at politisku ábyrgdarmenninir í hesum trimum ríkispørtunum tosa saman, hevur óivað týdning, og kann gera tað, at partarnir skilja betur hvønn annan.

Forsætisráðharrin var herfyri í Grønlandi. Tá segði hann, at grønlendingar fingu ikki rúmari sjálvstýri, um teir ikki eisini miðaðu ímóti at fáa ein meira sjálvberandi búskap. Tað má og kann hann sjálvandi siga, samstundis sum hann óivað ásannar, at grønlendingar kunnu krevja nógv størri sjálvsavgerðarrætt uttan at skorið verður í heildarveitingini, sum liggur um tríggjar mia. kr.

Grønland hevur so stóran týdning fyri Danmark í trygdarpolitiskum høpi, at Danmark má toyggja seg langt, um grønlendingar seta hart ímóti hørðum. Søgugransking og lívssøgur hjá donskum politikkarum vísa okkum í dag, at tá tann rættiliga nýskipaða norðuratlantssamgongan, NATO, skuldi leggja út kjarnorkuløðingar í evropeiskum londum, slapp Danmark og Noreg undan. Danmark slapp m.a. undan, tí Danmark stuðlaði so væl við at brúka Grønlandi. Har var tann týdningarmikla støðin í Norðurgrønlandi og har vóru eisini kjarnorkuløðingar, avdúkaðu søgufrøðingar fyri nøkrum árum síðani. Føroyar hava havt týdning, men neyvan so stóran týdning, tí tær verða lítið umrøddar.

Trygdarpolitikkurin hevur ikki so stóran týdning í dag, men afturímóti samstarv. Samstarvið millum ríkispartarnir tykist vera gott, hóast tað stundum hevur verið heldur kaldligt millum føroyska heimastýrið og donsku stjórnina seinastu árini. Vónandi skilja partarnir hvønn annan og vónandi koma partarnir skjótt í ta støðu, at teir tríggir partarnir veruliga eru javnsettir í einum ríkisfelagsskapi. Ein felagsskapur, ið vantandi sum fráliður verður umskipaður til ein ríkjafelagsskap við trimum ríkjum – og ikki við tveimum sjálvstýrandi økjum, sum sagt verður SO mannminkandi í Norðurlandahøpi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bøtandi hond

**Eg skal í hesi grein nevna trý ting, sum treingja til eina bøtandi hond**

**Edmund Joensen**
*løgtingsformaður*



**1. Framtaksgrunnurin**
Reglurnar um Framtaksgrunnin eigur løgtingið at fáa sett uppá pláss aftur.

Tað hevur í alt ov langa tíð verði skapt óróð og ótrygleiki um ognirnar og virksemið hjá Framtaksgrunninum (Fiskavirking og Fiskasøluni og øðrum ognum hjá grunninum).

Ótrygleikin byrjaði tá ið landsstýrið broytti reglurnar fyri Framtaksgrunnin, soleiðis at landsstýrismaðurin í praksis situr við hvørjari eigaraavgerð í kneppinum.

Upprunaligu reglurnar vóru júst ætlaðar tí øvugta, nevniliga at løgmaður tryggjaði nevndini arbeiðsfrið og tryggjaði, at avgerðirnar ikki vórðu politiskar.

Eg skal koma aftur til málið um Framtaksgrunnin í seinni grein.

**2. Fjølmiðlaábyrgdarlóg**
Fjølmiðlaábyrgdarlógin var samtykt í løgtinginum í 1997 men er ongantíð sett í gyldið fyri Føroyar, tí av løgtinginum broytta uppskotið leyk ikki treytirnar fyri ríkslógartilmæli. Síðan hevur sitandi landstýri arbeitt við einum serføroyskum uppskoti, men heldur ikki hetta er enn blivið til nakað.

Fjølmiðlaábyrgdarlógin má setast í gyldið. Tað ber ikki til í einum framkomnum samfelag, at vit ikki hava skipaði viðurskiftir á fjølmiðlaøkinum.

Tað hoyrir ongastaðni heima, at partarnir sjálvir eru í hornatøkum hvørja ferð eitt hvørt ivamál er viðvíkjandi pressuni. Fjølmiðlaábyrgdarlógin má setast í gyldi skjótast gjørligt, hon skal betur tryggja eina objektiva pressu og rættvísa viðgerð av persónum.

**3.Pensionistar**
Tað triðja málið eg ætla mær at nevna hesuferð, er viðvíkjandi pensiónum. Tá ið pensiónistar skulu viðgerðast skattliga, um teir hava aðra intøku enn pensiónina, verður eisini renta av innistandandi rokna sum inntøka. Tað er skiljandi. Men at skattur av rentuinntøkuni, eisini telur við í inntøkuna, tað tykist sera órímulig.

Hetta eiga tingmenn at kanna nærri og fáa broytt.

Eftirmetingar av lógum og reglum eiga alla tíðina at verða gjørdar. Tingmenn mugu eisini sjálvir seta fram uppskot um hetta. Tað ber av góðum grundum ikki altíð til at bíða eftir landsstýrinum.

# Bløðini og elektronisku fjølmiðlarnir

**Hans Birgir Hansen**
*Mr. Big*

Eg helt av fystan tíð av ikki nógv um bløðini, útvarp, sjónvarp. Síðan hevur ein fingið at sæð hvønn týdning, hesi hava fyri føroyingar, um vit skulu kunna fylgja við.

Eg havi fingið greitt frá ótrúliga nógvum í bløðunum, ið hevur gjørt støðuna greiðari mótvegis medmenniskjum og øvugt, øll hesi mótvegis einum seinastu árini.

Eg kann ikki annað enn vera nøgdur, og at ein við hjálp av teimum, hevur vunnið eitt lívslangt arvastríð, og tá ið ein fekk sær nóg mikið av kosttilskoti og motión.

Eg byrjaði fyri fáum árum síðani at liva og virka eftir mínum egna uppruna, og eg fann mítt egna støði, úti ímillum manna og eri komin aftur til dagliga lívið.

Eg havi við hjálp av bløðunum og live útvarpum og SvF sending Mr. Big, fingið skapt nýggjar fortreytir/grundarlag at liva og virka sjálvstøðugt í Havnini.

Eg fái skipa øll viðurskifti av nýggjum undir eftirliti, so ein hevur greiða mynd av heildarskipan og støðu og í einum fjølbroyttum samstarvið við fólk.

Eg fari at taka alment fram aftur arbeiðsskapandi verkætlanir, ið leingið hava ligið á láni, vegna lívslanga arvastríðið, ein áður greiddi frá í bløðunum.

Eg havi fingið sett nógv fjøltáttað virksemi í gongd, ov hvørs aðrir borgarar tóku sær æruna av, ið ikki eru hugsjónarfólk við sjálvstøðugum hugsjónum.

Eg arbeiði støðugt við at skapa mær nýggjar lívsavbjóðingar við altjóða fylgisveina samskifti, tele- og internet samskifti og við nýtslu av web-kamera.

Eg vil siga at gongst sum ætlað, skal Føroyar og umheimurin liggja opin fyri einum, tá ein er klárur at byrja sítt forrætnings virksemi av álvara í Havn.

Tað verður alt skipa frá kommunalari íbúð í Revagarðinum í Havn og ein fyrireikar Biggi Shop.

PS: Vitja heimasíðuna www.faroeinn.fo


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Stríðið um fullveldi má gerast partur av gerandisdegnum í Føroyum

**Røða hildin á fólkafundi á Doktaragrund Ólavsøkudag 29. juli 2002**

**Kjartan Hoydal**



Størsta politiska bakkastið seinastu 4 árini var, at fólkið ikki slapp at siga sína hugsan um framtíðarstøðu Føroya við einari fólkaatkvøðu.

Í einari støðu har partapolitikkur valdar og stakmál og persónar eru fremst eru allar grundir fyri at hava politisk amboð sum leggja kósina fyri longri tíðarskeið. Fólkaatkvøðan um sjálvstýri Føroya hevði júst verið ein tílik kósleggjandi politisk avgerð, sum hevði givið politiska arbeiðinum í Føroyum mál og mið.

Men vit fingu ikki fólkaatkvøðuna. Fólkaatkvøðuleiðin var stongd á hesum sinni. Vit mugu finna aðrar leiðir.

Ein av størstu vandunum fyri framtíðarmøguleikunum í Føroyum er, at vit ikki nýta okkara rætt og sum aðrar smátjóðir nýta allar teir møguleikar sum eru hjá sjálvstýrandi ríkjum at fóta sær í einum broytiligum heimi.

Fullveldisstríðið kom á dagsskrá og hevur stýrt føroyskum politikki síðani. Onkur heldur kanska at seinasta val – ommuvalið, sum onkur kallaði tað – merkir at fullveldið er farið av dagsskrá aftur. So er ikki. Fullveldisstríðið má og skal vera tann leiðbeinandi kraftin í øllum politiskum lívi í Føroyum, tí bert hetta tryggjar, at føroyskur politikkur setur eina ábyrgdarkós, sum verjur móti, at vit ikki aftur enda í lemjandi kreppum.

Men skuldi politiska stríðið linka og hin gamli »hugnaligi« løgtingspolitikkurin, sum summir løgtingsmenn leingjast so sára eftir, aftur fingið valdið, so kemur fullveldisspurningurin aftur, men hesaferð úr Danmark í samband við gongdina í ES.

Hin stóra rættarliga tvísøgnin: danski limaskapurin í ES

Ein sterk fólkslig andstøða uttantings bjargaði í 1972 Føroyum undan at enda í EEC saman við Danmark. Hetta er týdningamesta politiska hending í heimastýristíðini.

Árið eftir avgjørdi danska stjórnin at boða ES frá, at EEC sáttmálarnir ikki »finder anvendelse« fyri tann ríkispartin sum eitur Føroyar. Uttan iva væntaðu danir, at føroyingar fóru at broyta støðu, men hetta hendi ikki og hevur hetta skapað eina stóru rættarligu tvísøgn í danska ríkinum. Danska fólkatingið letur fullveldi til ES, samstundis sum sama ting tvíheldur um, at tað hevur fullveldið yvir Føroyum. Hetta merkir at tað fullveldi, sum Danmark letur, ikki bert er teirra egna, men eisini okkara. Hetta verður gjørt uttan at føroyskir myndugleikar vera eftir spurdur.

Við at tvíhalda um, at teir heva fullveldið yvir Føroyum, er støðan hjá dønum, vorðin púra skilaleys. Hvussu kunnu danskir myndugleikar lata fullveldi Føroya til ES, uttan at spyrja føroyingar um loyvi?

Um Danmark fer næstu stigini og letur fullveldi í uttanríkispolitikki, rættarpolitikki og øðrum stórum politikkøkjum til ES, so kemur fullveldisspurningurin uttan politiskt stríð í Føroyum aftur ovast á dagsskrá.

Tey sum tosa fyri loysnum innan fyri ríkisfelagsskapin fáa tá ein sera stóran politiskan trupulleika, tí um fullveldi áhaldandi verður flutt frá danska fólkatinginum til ES, so vera bert tveir møguleikar eftir hjá Føroyum: At taka fullveldi heim ella at gerast eitt danskt amt aftur.

**Løgtingssamtyktin um sjálvsstýri**
Vit fingu ikki eina fólkaatkvøðu, men eina løgtingssamtykt, sum leggur ein 12 ára ætlan. Løgtingsavgerðin var røtt undir umstøðunum, og var ein staðfesting av, at løgtingið út frá »ómissandi og framhaldandi sjálvsavgerðarrætti«, tók undir við, at farið varð undir eina miðvísa fullveldisætlan. Sjálvsavgerðarrætturin varð staðfestur. Løgtingið setti við hesum – og henda samtykt stendu enn við – eina dagsskrá, sum rakk um fleiri valskeið – tað var nýskapandi í sjalvum sær.

Støðið er longu fyri lagt undir einum politikki sum ger karmarnar í føroyska samfelagnum greiðari, meira gjøgnumskygdar og støðugari. Sjálvstýrisætlanin setur enn dagsskránna og tey sum eru ímóti føroyskum sjálvbjargni og veruligum føroyskum sjálvstýri mugu taka støðu út frá hesi ætlan.

Fremst móti henni stendur hin gamli løgtingspolitikkurin, sum ikki sær meira enn eitt valskeið ísenn, sum ikki vil viðgera heildir, men stakmál, og sum ikki vil viðganga, at politiskar avgerðir eru raðfesting og val millum øki, sum kappast um avmarkað tilfeingi. Sum ikki vil viðganga, at tað ikki ber til at reka politikk sum tað var vanligt áðrenn kreppuna, uttan at seta vælferðina í vanda. Og sum ikki megnar at skilja, at vælferð okkara bert kann skapast í Føroyum.

**Eru vit a veg aftur í 80'ini**
Er hin gamli politikkurin aftur um at fáa valdið á tingi og í landsstýri? Summi halda so er. Tað tykist sum løgtingspolitikararnir hava lyndi til at falla aftur í tað gamla arbeiðslagið, ein politikkur uttan mál og mið og tíðarkarm, sum handlar um at gera politiskar semjur heldur enn at finna rættar loysnir. Í 80'unum var ein stórur partur av politikkinum um hvussu løgting og landsstýri kundi býta tær stóru almennu inntøkurnar – og donsku veitingarnar – út sum studning og veðhald, so at skattaborgarin bar váðan av føroyskum vinnulívi.

Í flestum av nítiárunum loyvdi støðan í landskassanum ikki hesum politikk og vinnan kláraði eftir stuttari tíð at nýta teir møguleikar, sum hin stóra skuldasaneringin gav, og virkar nú yvirhøvur á vanligum handilsligum grundarlagi.

Hetta merkir at støðan í dag er heilt øðrvísi enn hon var í 80'unum. Vinnulívið stendur á egnum beinum og hevur bæði váða og vinning, fíggjarstovnarnir virka, og stuðul til vinnulívið er ein avmarkaður partur av løgtingspolitikkinum.

Men har er eitt stórt men. Kreppur bæði fyrr og í nítiárunum hava ført við sær at politiska skipanin hevur fingið ábyrgd av pørtum av vinnulívinum og haraftrat hevur landið fíggjað og eigur ymiskar tænastur, sum aðrastaðni verða riknar á privatum grundarlagi. So ella so eigur landið virði í fyritøkum og grunnum fyri meira enn 3,7 milliardir krónur. Hetta letur møguleikanum upp fyri at taka upp aftur hin gamla politikkin, hesaferð ikki sum peningaligur studningur, men at lata landsins ognir av hondum við politiskum fyriliti heldur enn vinnuligum og handilsligum.

Ráðini eru – ongantíð ov skjótt – at fáa gongd á, at fyritøkur og tænastur, sum ikki eiga at vera har, verða tiknar burtur av politiska leikvøllinum og javnvágin millum alment og privat verður bøtt.

**Avbjóðingarnar**
Føroyar standa í dag fyri stórum avbjóðingum, heima og alheimsliga. Vit eru í øldir vundin gjøgnum skipanir, sum er skapaðar til aðra tjóð og aðrar umstøður. Hóast hetta hava vit fótað okkum tjóðskaparliga.

Í dag letur heimurin seg upp.Trýstið kemur ikki bert frá miðveldinum, vit liggja meira opin fyri øllum heiminum. Í hesum eru vandar, men eisini møguleikar, vinnuligir og mentanarligir, sum kunnu loysa upp fyri tí søguligu binding vit í so nógv ár hava havt til eina tjóð í landsuðri.

Í hesi alheimsgerð liggja serligir vandar fyri útjaðaraøki, sum liggja langt frá menningardeplum á meginlandinum. Vit avgera sjálvi um vit vilja vera útjaðari, ein fjarskotin ríkispartur í einum miðveldi, sum hevur onnur áhugamál enn okkara, ella um vit vilja taka tjóðskaparliga avgerðarrætt okkara í álvara og seta okkum greiða málið at byggja okkara egna burðardygga samfelag í Norðuratlantshavi. Um vit vilja lofta teimum stóru møguleikum alheimsgerðin gevur okkum til at byggja upp eitt samfelag, sum bjóðar øllum føroyingum – eisini teimum nógvu, sum í dag virka í øðrum londum – møguleikan at byggja einar ríkari og sterkari Føroyar. Gera vit ikki hetta verður tað sera torført at klára seg í kappingini við grannalond okkara og vandi er fyri búskaparligari afturgongd, sum vit síggja tað í so nógvum útjaðarum í okkara heimsparti.

Ein av stóru avbjóðingunum er at fáa eina semju – og ikki bert eina politiska – um hvussu vit skipa okkara samfelag av nýggjum heldur enn framhaldandi at skriva av eftir loysnum uttanifrá.

Tað fyrsta er at semjast um hvørjar tænastur vit vilja hava og um hvørjar teirra skulu vera okkara felags ábyrgd og rekast alment. Tað hevur størri týdning enn bygnaður og játtanir. Tá hetta er fingið til rættis er stóra takið at fáa tey sum starvast á hesum økjum at taka undir við og ábyrgdina av neyðugum broytingum. Síðani kemur spurningurinn um at útvega neyðugu játtanir.

Hetta er arbeiði, sum sum tekur langa tíð og í veruleikanum ongantíð endar. Tað er tí stórt spell at gongd ikki er sett. Lítið er frætt um royndir at finna loysnir, har fyrimunurin av at vera eitt lítið opið samfelag verður nýttur, tá ódýrar og dyggar loysnir fyri almennar tænastur skulu finnast. Vit hava í alt ov stóran mun skipanir sum hóska til ein danskan leist, eitt samfelag sum er 100 ferðir størri enn okkara.

**Møguleikarnir**
Vit hava tveir møguleikar. At detta niður aftur í hin gamla løgtingpolitikkin ella at ganga tað nýggju sjálvbjargnis- og sjálvstýrisleiðina.

Hin gamli løgtingspolitikkurin kravdi lítið, men varð okkum dýrur.

Ein nýggjur sjálvstýrispolitikkur krevur nógv meir. Hann krevur at vit øll taka ábyrgd av og lut í førda politikkinum. Heima og til arbeiðis – í dagligum práti og alment í fjølmiðlunum.

Hann ásannar, at búskaparligt langtíðar skilvísi er einasta grundarlagið undir vælferð í Føroyum. Hann ásannar at neyðugt er at broyta nógv í samfelagnum til at fáa alt at sampakka betri við føroyskar liviumstøður.

Ábyrgdin er okkara. Tað nyttar ikki at lasta øðrum, tað nyttar ikki at bíðja eftir, at onkur annar skal skipa alt fyri okkum ella leggja okkum loysnir til rættis.

Ein týdningarmikil fyritreyt fyri at hetta kann hepnast er ein sterk rørsla og meiningsskapan, uttan fyri løgtingið, leys av partapolitikki, sum heldur málið fyri eyga og vísir á tørvin á at taka størri ábyrgd í øllum samfelagsviðurskiftum fyri at føroyska samfelagið framhaldandi skal taka seg fram.

Ikki fyrr enn hetta er komið í lag koma vit burtur úr núverandi politiska máttloysinum. Í hesi gongd hevur tað stóran týdning at leggja mál út til alment orðaskifti har øll kunnu taka lut og ikki bert politisku flokkarnir og embætisverkið.

Lat okkum nýta fólkafundir – og øll onnur amboð – í fullveldisstríðiðnum, so tað aftur verður partur av gerandisdegnum í Føroyum.